Annika Sølvará, stjóri í Granskingarráðnum

## Granskingarráðið 20 ár - Virksemið fyrr og nú

Tá tú fyllir 20 ár, ert tú vaksin. Ikki bara sum fólk, men eisini sum stovnur. Tá er hóskandi høvi at hyggja aftur á, hvaðani tú kom, hvar tú ert nú og hvar tú fert. Tað er endamálið við hesum degnum, har vit hátíðarhalda, at Granskingarráðið er 20 ár.

Sjálv havi eg fylgt føðingardagsbarninum meira enn helvtina av tíðini, fyrst frá 1998-2002 á Fróðskaparsetrinum og síðani á Bryggjubakka sum stjóri frá síðst í 2007. Lat meg siga beinanvegin, at eg haldi, at Granskingarráðið hevur ment seg munandi hesi árini og hevur givið sítt fitta íkast til samfelagið. Samstundis haldi eg, at eins og hjá flestu 20 ára gomlum, so eru tey mest produktivu árini fyri framman enn.

Tá Granskingarráðið varð sett á stovn við lóg 20. mai 1996, var talan um eina ráðgevandi nevnd undir Undirvísingar- og Mentamálastýrinum við 7 limum. Arbeiðið varð skipað á Fróðskaparsetrinum við einum ¼ skrivara. Uppgávurnar lógu tá næstan burturav á ráðslimunum og vóru at ráðgeva breitt í granskingarpolitiskum spurningum, at fylgja við í granskingarspurningum, at viðgera umsóknir um granskingarstuðul og gera tilmæli til landsstýrið um stuðul til gransking.

Fyrstu árini var tað Undirvísingar- og Mentamálastýrið, sum lýsti eftir umsóknum um stuðul til gransking. Lýsingin í 1997 var stutt og krøvini fá: "Játtanin fer til at stuðla føroyskari gransking, bæði í Føroyum og í millumtjóða samstarvi." Restin var upp til umsøkjaran at skriva á umsóknarblaðið, sum fekst við at venda sær til Granskingarráðið við posti ella telefon.

Umsóknir skuldu fyrstu nógvu árini latast inn í pappíri, í 9 eintøkum, til fyrisitingina og til allar nevndarlimirnar. Limirnir i Granskingarráðnum viðgjørdu umsóknirnar og gjørdu síðani tilmæli til Undirvísingar- og Mentamálastýrið um, hvør átti at fáa stuðul. Tað sær út til, at tilmælini altíð vóru fylgd.

Fyrsta granskingarjáttanin sær út til at verða latin til Katrin og Kaj Kallsberg til "Granskingarætlan viðvíkjandi sjúkra- og kontaktmynstrinum í almen praksis í Føroyum."

Í 1997 vóru 19 umsóknir um stuðul, av hesum fingu 9 játtað stuðul, tilsamans eina knappa millión krónur.

Longu í 1998 var gjørligt at finna umsóknarblað og vegleiðing á netinum, á sleipnir.fo og at senda fyrispurningar við telduposti. Tað varð tó framhaldandi krav, at umsóknir skuldu sendast við vanligum posti. Summar komu eisini við fax úr útlondum. Hendan mannagongd var endaliga broytt í 2009. Síðani hava umsóknir verið kravdar við telduposti. Yvirhøvur er mannagongdin moderniserað, men er kortini grundleggjandi eins við fastari árligari umsóknarfreist, fakligari meting av umsóknum, viðgerð av øllum umsóknum í einum og sama umfari, og so avgerð 2-3 mánaðir seinni.

Fyrstu 5 árini kundi granskingarstuðul bert latast til eitt ár í senn. Tað var tískil neyðugt hjá teimum fyrstu, sum fingu stuðul til ph.d.lestur, at søkja á hvørjum ári og eingin vissa var fyri, at til bar at halda fram.

Tað var skjótt greitt, at tað var neyðugt at skipa økið betri. Eitt var, at tørvur var á at kunna játta stuðul til eina heila verkætlan og ikki bara eitt ár í senn. Tað var heldur ikki serliga praktiskt ella skilagott, at meting av góðsku og samfelagsnyttu og hvør skuldi fáa stuðul lá á einum stað, meðan ábyrgdin av játtan og uppfylging lá aðra staðni.

Tær royndirnar, sum vóru gjørdar við granskingarstuðli fyrstu árini, leiddu til eina ásannan av, at tað var neyðugt at stovnseta eitt meira umfatandi skrivstovuhald við fólki, sum arbeiddi burturav við allari tilgongdini frá vegleiðing av umsøkjarum til uppfylging av stuðlaðum verkætlanum.

Í lóg um gransking frá 2001 varð Granskingargrunnurin skipaður sum almennur, sjálvstøðugur stovnur við egnum skrivstovuhaldi, við heimild at flyta játtan um fíggjarár og við ábyrgd av at játta og umsita granskingarstuðulin. Ráðgevingaruppgávurnar vóru framhaldandi týðandi partur av ábyrgdarøkinum.

Hendan broytingin hevur havt stóran týdning fyri gransking í Føroyum. Granskingarráðið, sum seinni bleiv til Granskingarnevndin, hevur saman við fyrisitingini havt møguleika at læra av royndunum frá ymsu verkætlanunum og at taka rák til sín uttan úr heimi. Síðani virksemið varð skipað í egnum stovni, eru krøv til umsøkjarar leypandi tillagað og herd, og tað verður fylgt neyvari við verkætlanum, sum eru stuðlaðar. Við hesum eru bæði umsøkjarar og fyrisiting blivin betri til at seta orð á verkætlanir og krøv.

Vit hava í dag gransking og granskarar á nógvum ymsum økjum, nógv fleiri enn fyri 20 árum síðani. Hóast nevndarlimir okkara eru væl skikkað og nærløgd fólk, so er eingin møguleiki, hvørki fyrr ella nú, at teir skulu kunna meta umsóknirnar fakliga í smálutum. Eitt meginamboð í góðskumetingini er tí útlendsku serfrøðingarnir, sum verða bidnir um at meta um umsóknir. Hesar metingar eru eitt dygt grundarlag hjá nevndini at stuðla seg til í støðutakanini til, hvør eigur at fáa stuðul. Hetta er ofta eisini eitt gott amboð hjá umsøkjarum at arbeiða víðari við, bæði um tey fáa stuðul ella mugu arbeiða víðari við umsóknini. Vit fáa við hesum óheft eygu á okkara gransking og kunnu á tann hátt samanbera stigið í Føroyum við grannalond okkara.

Tað hevur alla tíðina verið týdningarmikið fyri Granskingarráðið eins og restina av granskingarumhvørvinum at hyggja úteftir, at taka rák til sín og at samstarva við umheimin.

Í mong ár varð tosað um, at Føroyar áttu at luttikið í ES-granskingarsamstarvinum, sum øll hini londini eru við í. Føroyskir granskarar samstarvaðu frammanundan við granskarar kring allan heim, men ynski var um, at vit eins og hini skuldu fáa atgongd til samstarvs- og fíggingarmøguleikar, sum vóru alt meira skipaðir og savnaðir í Evropa.

Í 2007 varð av álvara sett ferð á hesar ætlanirnar við at seta fólk í Granskingarráðnum við ábyrgd av hesum økinum burturav og við at fara í ítøkiligar samráðingar við ES um samstarv. Tað tók drúgvari tíð enn ætlað, men í juni 2010 varð avtalað endiliga undirskrivað um granskingarsamstarv millum ES og Føroyar. Vit komu við í 7. rammuskránna, FP7, miðskeiðis í 7 ára skeiðinum og komu heilt væl frá byrjan. Í 2014 fór nýggja skráin, Horizon 2020, av bakkastokki, og eftir enn eitt samráðingarumfar, sum var munandi styttri, fingu Føroyar

atlimaskap í evropeiska samstarvinum, sum nú er víðkað til at fevna um gransking, menning og nýskapan.

Eins og í ítrótti, so er eingin ivi um, at vit her fyrstu árini hava verið við fyri at læra. Eins og við fyrstu árunum við Granskingarráðnum, so hava føroyskir stovnar og fyritøkur skula lært seg at síggja ítøkiligu møguleikarnar og at søkja stuðul. Gáttin er hampiliga høg, men vit síggja út til at læra skjótt og væl á fleiri økjum. Fleiri møguleikar eru enn ikki fult troyttir, men vit eru væl ávegis at royna ymsu skipanirnar.

Talið av umsóknum til Horizon 2020 er støðugt vaksandi, bæði frá almennum granskingarstovnum og frá fyritøkum, fleiri játtanir eru latnar verkætlanum til arbeiði í Føroyum og netverkini verða alsamt styrkt.

Granskingarráðið hevur fingið stuðul frá FP7 til fleiri uppgávur. Ein av hesum er til EURAXESS kunningartænastuna, sum skal gera leiðina fyri granskarar til Føroya smidligari. Her er ein portalur mentur, sum serliga er ætlaður at vegleiða granskarum, men sum eisini er hentur hjá øðrum starvsbólkum, so hava hug at koma til Føroya. EURAXESS kunningartænastan er nú ein partur av gerandisuppgávunum hjá stovninum

Ein av stóru avbjóðingunum í Føroyum eins og aðra staðni er, at gransking, menning og nýskapan – sum øll eru í familju so at siga – eru økið, sum ábyrgdarliga liggja spjadd á fleiri ymisk aðalráð og sum fatanarliga eru nokkso ymisk, alt eftir hvaðani tú hyggur, frá fakøkjum, úr politiskum sjónarhornum og frá tí almenna ella privata. Hóast øll kenna øll í Føroyum, so er eisini í Føroyum ávís frástøða millum partarnar, sum játtað pening til virksemi, tey, sum arbeiða við pengunum, tey, sum gagnnýta úrslitini og almenningin.

Tað hevur verið tosað nógv um, hvussu vit fáa meira samstarv og betri felags fatan av avbjóðingum og kós. Við lógarbroyting í 2006 var nýtt ráð stovnssett, Føroya Vísindaráð, við íblástri úr Finnlandi og Íslandi, sum skuldi vera forum, har politiska skipanin, granskingarumhvørvini og vinnan skuldu hittast at kjakast og seta orð á ynskir og ambitiónir.

Fyrsta Vísindaráðið varð tilnevnt seint í 2008. Eftir fleiri fundir í Vísindaráðnum og samskifti við granskingarnevndina og Granskingarráðið ímillum fundirnar, var í januar 2011 semja í Vísindaráðnum um fyrsta yvirskipaða granskingarpolitikk Føroya, sum fekk heitið Vitan & Vøkstur.

Sum ásett í politikkinum so arbeiddu Granskingarnevndin og Granskingarráðið víðari við eini ætlan fyri verksetan av politikkinum. Millum annað vóru hoyringar í granskingarumhvørvinum. Tilmælið varð handað landsstýrinum í mars 2013.

Hvørki politikkurin ella tilmæli um verksetan fingu nakra almenna politiska viðgerð, men tað er eingin ivi um, at arbeiði við politikkinum, sjálv tilgongdin og kjakið, hevur sett síni spor og hevur havt ávirkan.

Mest ítøkiliga dømið er politiska avgerðin um at lata Granskingarráðið umsita fæið úr Sjúkrakassagrunninum til at menna heilsuøkið. Her hava allir partar fingið íblástur úr granskingarpolitikkinum og tilmælinum um fokusøki, sum vóru í ætlanini fyri verksetan.

Ein av uppgávunum hjá Granskingarráðnum, sum verður raðfest sera høgt, er almenn kunning um gransking. Talan er bæði um ta gransking, sum verður stuðlað úr Granskingargrunninum, men eisini um gransking sum heild í Føroyum og sum viðkemur Føroyum. Endamálið er bæði at vísa, hvat játtanin til Granskingargrunnin verður brúkt til og at skapa størri tilvit um gransking og samfelagsliga virðið av gransking.

Tað er eingin ivi hjá okkum, at tað er alneyðugt fyri forstáilsi og stuðulin millum fólk, at vit brúka orku uppá at miðla hesi evnini, sum ofta eru torskild og umfatandi, og at vit eisini krevja av granskarum, sum fáa játtaðan stuðul, at teir miðla alment.

Vit hava í fleiri ár havt ein dátugrunn á gransking.fo, kallaður Stuðulsyvirlitið, har tað sæst, hvørjar verkætlanir stuðul er latin til, hvussu nógvur stuðul er játtaður, hvar verkætlanin er í mun til tíðarætlanina og fyri tær, sum eru lidnar, hvat kom burturúr. Saman við hesum grunnin hava vit Heilagrunnin við yvirliti yvir granskarar. Grunnarnir verða áhaldandi dagførdir, so fjølmiðlar, politikarar ella almenningur kunnu kunna seg við ymsu verkætlanirnar og seta seg í samband við viðkomandi granskara um ynski er um tað.

Vit hava í fleiri ár á rað samskipað tiltakið Vísindavøka, sum er eitt felags tiltak hjá øllum granskingarstovnunum í Føroyum. Móttøkan hevur verið sera góð og tiltakið er vaksið munandi. Tiltakið er alment og øll eru vælkomin, men vit hava lagt okkum eftir at skipa serlig tiltøk til børn og ung fyri at kveikja áhugan fyri vísindum og gransking.

Ein avbjóðing í mun til at kunna bjóða fólki kring alt landið við er avmarkaða arbeiðs- og fíggjarorkan. Her royndu vit í fjør eitt nýtt tiltak, sum vit kallaðu Vísindavøkan á ferð. Í eina viku vóru hildnir 45 fyrilestrar við næstan 1500 áhoyrarum tilsamans. Afturmeldingarnar vóru so góðar, at vit helst fara at royna hetta aftur, um stovnarnir og starvsfólkini hava orku til tað.

Hóast nógvar ymsar og skiftandi uppgávur, so er tað árligi stuðulin til gransking, sum fyllir nógv og helst sæst best í virkseminum hjá Granskingarráðnum.

Um vit taka samanum á hesum økinum, so eru tað í alt játtaður stuðul til nærum 200 verkætlanir hesi 20 árini. Av hesum eru á leið 80 ph.d. verkætlanir, næstan 50 av hesum eru lidnar, nakrar eru í gongd meðan nakrar fáar eru um at fara í gongd.

Sum tað sæst í faldaranum og á framsýningini í forhøllini, so eru umleið 150 ph.d og doktaraverkætlanir loknar farnu 20 árini, tað vil siga, at ein triðingur hevur fingið stuðul úr Granskingargrunninum. Av teimum umleið 60 ph.d. verkætlanunum, sum vit vita eru í gongd í løtuni, fær nærum helmingurin stuðul úr Granskingargrunninum. Hetta sigur ikki sørt um, hvussu stóran leiklut stuðulin hevur í menningini av gransking í Føroyum, í arbeiðinum at seta nýggj fólk við og at geva náðir til at kanna evni enn meira út í æsir. Endamálið er altíð tað sama, at finna nýggja vitan, fleiri svar og nýggjar spurningar at seta, at skapa møguleikar fyri betri

Stuðul til gransking eigur og fer uttan iva framhaldandi at vera ein av høvuðsuppgávunum hjá Granskingarráðnum. Samstundis eigur eisini at verða sett orka av til at arbeiða við evnum, sum hava týdning fyri alt umhvørvi, og sum tað við fyrimuni kann verða arbeitt

saman um, heldur enn á hvørjum stovni ella hvørjum aðalráði sær. Her eru vit í løtuni í gongd við fleiri evni og øki, har vit hava ein samskipandi og ráðgevandi leiklut.

Vit eru í vár farin at fyrireika eina kanning og kortlegging av granskingarinfrakervinum í Føroyum. Her er ætlanin at hyggja serliga væl at økinum registaragransking.

Vit eru farin undir at arbeiða við Open Access politikki, fyrsta stigið varð tikið í mars 2014, tá Granskingarnevndin samtykti í prinsippinum at taka undir við Open Access politikki fyri vísindaligt arbeiði, sum er fíggjað úr Granskingargrunninum. Næstu stigini er at tryggja karmar fyri Open Access útgávu. Eitt gott amboð her er stuðul til vísindaliga útgávu, sum vit fáa latið við fígging frá Vísindagrunninum hjá EIK, sum vit fingu litið upp í hendur í 2015.

Vit ætla at skipa fyri nøkrum tiltøkum í heyst, har vit fara at seta aktuell evni á skrá. Eitt verður ein verkstova um vinnugransking og eitt annað verður eitt kjaktiltak um granskingaretikk.

Vit eru sannførd um, at Granskingarráðið bæði kann og eigur at spæla ein nógv størri leiklut á granskingarøkinum í framtíðini. Umframt aktuellu málini er ein ørgrynna av uppgávum og evnum, sum eru tvørgangandi og yvirskipaðar, sum hvør stovnur hvørki kann ella hevur fyri neyðini at lyfta einsamallur. Hesar uppgávur átti Granskingarráðið í enn størri mun at átikið sær. Tað er í hesum sambandi tó alneyðugt, at stovnurin verður styrktur við starvsfólki og fíggjarligum rásarúmi, so til ber at lyfta hesa uppgávur.